gult cyan magenta svart

Barnasangir til børnini hjá børnunum



RÚNAR REISTRUP

Fyri fimmogtjúgu árum síðan, í árinum 1975, gav Hjørdis Johansen út plátuna "Barnasangir" við 27 kendum og ókendum barnasangum í vinylinum. Síðan tá eru nógvir av teimum tá ókendu barnasangunum vorðnir fólkaogn.

Men meðan sangirnir á plátuni hava livað víðari hesi farnu 25 árini, eru teir flestu plátuspælararnir antin tveittir burtur ella goymdir á ovastalofti, og tí er tað ikki heilt av leið, at Plátufelagið Tutl hevur tikið stig til at endurútgeva tey 27 løgini á plátuni sum fløgu.

Fleiri av børnunum, sum fyri 25 árum síðan lurtaðu eftir plátuni og sungu sangirnar í barnagarðinum, eru sjálvi vorðin foreldur at børnum. Fløgan "Barnasangir" hjá Hjørdis Johansen er soleiðis stílað til børnini hjá børnunum, sum hoyrdu upprunaligu plátuna.

Tíðin hevur ikki bara elt lurtararnar. Um hugt verður eftir nøvnunum á teimum smágentunum, ið sungu barnasangirnar á plátuni í 1975, síggjast nøvn, ið nú verða sett í samband við vaksnar kvinnur. Millum nøvnini á ungu sangarinnunum sæst millum aðrar Maria Guttesen, sum síðan tá rættiliga hevur gjørt um seg innan føroyskan rocktónleik við solofløguni "Where it all begins". Hinar sangarinnurnar, ið sungu løg á plátuni, eru Hansina Iversen, Eyð Rasmussen, Birita Petersen, Malfríð Jacobsen, Unn Rasmussen og Hjørdis Johansen.

Tutl endurútgevur javnan gamlar LP-plátur, ið plátufelagið gav út í tíðini áðrenn ljómfløguna.

Eyðun og Terji ikki í Badmintonhøllini

RÚNAR REISTRUP

Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen, sum í fjør góvu út fløgu saman, skuldu eftir ætlan spæla í Badmintonhøllini í Havn í kvøld.

Men hettta verður nú av ongum orsakað av misskiljingum millum høllina og tónleikararnar. Fyri ikki at tónleikararnir, ið eru komnir bæði úr Danmark og Kanada, skulu hava ferðast til Føroya til einkis, hava Eyðun og Terji valt at spæla í Casablanca í kvøld ístaðin.

Leygarkvøldið verða teir báðir og bólkur teirra at hoyra í VB-húsinum í Vági.

Tjúgu vetur gamal veðrur

Hann er hvørki blivin seigur, ovfitaður merktur av øðrum ellistekinum. Men hann er vorðin gamal, tann heiðursmerkjaprýddi veðrurin úr Klaksvík, sum flestu føroyingar hava smakkað kjøtið av

RÚNAR REISTRUP

Hvíta lambið í seyðafylginum hjá Føroya Bjór, ið varð lembt fyri tjúgu vetrum síðan, er við árunum vorðið til ein væl vaksnan veðr.

Leygardagin heldur veðrurin sín tjúgu ára lembingardag og bóndin, Føroya Bjór, hevur valt at hátíðarhalda hetta við at bjóða tveytúsund serbitar út.

Talan er um 2.000 fløskur við vanligum veðraøli í, men við serligari etikett. Fløskurnar eru talmerktar, og tað er eyðsæð, at Føroya Bjór hevur ætlað serligu ølfløskurnar til savnarar. Hesar serútgávur fáast bert til keyps á goymslunum hjá Føroya Bjór.

Nógv er broytt, síðan fyrstu fløskurnar av veðraøli vórðu sendar á marknaðin 15. juli í 1980. Nú fæst veðrurin á nærum øllum føroyskum matstovum, og til ber at fáa hann í "hondkeypi" hjá Rúsdrekkasølu Landsins og hjá bryggjarínum sjálvum.

Sum fólk lukkuliga royna at gloyma, var tað ikki soleiðis í 1980. Tá skuldi bæði ringjast, bíðast eftir postinum, girokort gjaldast og skattaviðurskiftini vera í lagi, áðrenn ølið kundi fáast til høldar.

Fer ikki uttanlands

Hóast veðrurin er nógv tað mest selda ølið í Føroyum - eisini um samanborið verður við donsku sløgini - so hevur Føroya Bjór ikki tær stóru ætlanirnar við at selja ølið uttanlands. Veðrurin trívist best í Føroyum

Nakrar einstakar barrir og matstovur í Danmark hava tó veðr á ølkortinum, og summi føroyingafeløg niðri selja eisini veðraøl. Í Íslandi verður eisini selt nakað av veðraøli.

Men hendan sølan uttanlands er heilt lítil samanborið við heimamarknaðin, og tað fer hon framhaldandi at vera.

Orsøkin til at Føroya Bjór ikki roynir seg uttanlands við viðurkenda ølinum er einføld. Føroya Bjór er, hóast tað kann tykjast sum eitt stórt bryggjarí her í Føroyum, so evarska lítið í altjóða høpi, at tað á ongan hátt ber til at kappast ímóti heimsumfatandi bryggjaríum so sum Carlsberg á størru marknaðunum.

Til samanberingar kann nevnast, at ársumsetningurin hjá Føroya Bjór bert er til støddar sum ein lítil brotpartur av teirri upphædd, ið Carlsberg bryggjaríið hvørt ár brúkar til marknaðarføring, og nevniliga marknaðarføringin er tað, sum ger munin millum vinning og tap í kappingini á altjóða ølmarknaðinum.

Tí er tað lítið hugsandi, at tann nú tjúgu vetur gamli veðrurin nakrantíð fer at gerast eitt kent ølmerki uttan fyri Føroyar.

Men her fer hann eftir øllum at døma at liva nógv ár afturat.

Serútgáva nummar 885 av veðrinum hjá Føroya Bjór, ið hevur tjúgu ára lembingardag leygardagin

Gera føroyska Afzelius-fløgu

Upptøkurnar til eina fløgu við føroyskum týðingum av sangum hjá Bjørn Afzelius eru byrjaðar. Ymiskir tónleikarar og sangarar eru við

EYÐUN KLAKSTEIN

Nú fær tiltikni svenski sangskrivarin, Bjørn Afzelius, eina heila fløguútgávu við sínum sangum á føroyskum. Fløgan, har ymiskir føroyskir tónleikarar og sangarar fara at luttaka á, kemur út í heyst.

Tað er Studio Pegasus í Klaksvík, sum hevur tikið stig til fløguna, og fyrstu upptøkurnar eru longu gjørdar.

- Bjørn Afzelius hevur verið væl dámdur í Føroyum, og hann hevur eisini inspirerað fleiri føroyskarar sangskrivarar. Tí er tað rættiliga upplagt at gera eina fløgu við týðingum av nøkrum av hansara sangum, sigur Steintór Rasmussen, sum rekur Studio Pegasus, og sum samskipar arbeiðið at gera Afzelius-fløguna.

Hann hevur saman við Jóannesi Jakobsen og Poul Jacob Vitalis gjørt týðingarnar av sangunum hjá Afzelius, sum verða við á fløguni.

Ikki bara kærleiki

Í løtuni verður arbeitt við 9 sangum til fløguna. Tveir av teimum verða av útgávunum hjá Jóannesi Jakobsen, sum hevur týtt fleiri Afzelius-sangir til sínar tríggjar útgávur, meðan allir hinir verða innspældir av nýggjum.

Millum sangirnar eru teir kendu Ikaros, Juanita og Isabelle, men ætlanin er ikki bara at taka tær vøkru kærleikssangirnar, sum Afselius dugdi so væl at gera.

- Vit kundu ivaleyst gjørt eina sera vakra og fitta fløgu bara við kærleikssangum hjá Afzelius, men tað gera vit ikki. Vit brúka sangir frá ymiskum tíðarskeiðum hjá honum, og vit taka eisini onkrar av teimum meira ágangandi, politisku sangunum hjá honum við á fløguna, sigur Steintór Rasmussen.

- Bjørn Afzelius hevur skrivað rættiliga nógvar sangir, og tað er langt frá alt, sum er líka gott. Men hann hevur sanniliga gjørt nakrar frálíkar sangir, sum veruliga standa eftir, og tað verða millum annað onkrir av hesum sangunum, sum verða á fløguni.

Kendasta føroyska týðingin av einum Afzeliussangi er helst Sangur til frælsi, sum kom út á fyrstu plátuni hjá Frændum í 1984. Hesin sangurin verður endurinnspældur til nýggju fløguna.

Hava nakað at samalíkna við

Allar upptøkurnar verða gjørdar í Studio Pegasus í Klaksvík, og tað er Erik Biskopstø, sum leggur tónleikaliga partin til rættis.

Ymiskir føroyskir tónleikarar koma at spæla á útgávuni, og Eyðun Nolsøe hevur longu gjørt onkrar upptøkur. Afturat honum verða eisini tónleikarar sum Jógvan Olsen, Herluf Lútzen og Ronnie Nielsen.

Enn er ikki rættiliga greitt, hvør skal syngja sangirnar, men tað verða ymiskir sangarar til sangirnar. Eyðun Nolsøe skal syngja onkran sang, og so er eisini upp á tal, at Eivør Pálsdóttir og Hanus G. Johansen verða við. Í hvussu so er verður tað ein blanding av kendum føroyskum sangarum, sum luttaka á fløguni.

- Fløgan verður trúgv ímóti yrkingunum og tónleikinum hjá Afzelius, og vit fara at gera okkum stóran ómak við upptøkunum, tí fólk hava jú nakað at samanlíkna føroysku útgávurnar við, sigur Steintór Rasmussen.

- Tí er tað kanska eitt sindur djarvt, at fara í holt við eina slíka útgávu, men um vit gera eina góða fløgu, so rokni eg eisini við, at fólk fara at taka væl ímóti henni.

Ætlanin er at gera eitt sindur burtur úr, tá fløgan kemur út eina ferð í heyst, og um onkur er, sum heldur seg liggja inn við onkrari góðari Afzelius-yrking, so er tað ikki óhugsandi, at hon kann koma við á fløguna, um viðkomandi setir seg í sambad við Studio Pegasus.

gult cyan magenta svart

Fáa n‡ggja ferju í heyst

Ein 40 metra long tvíkilja, sum tekur 200 fólk skal frá september sigla millum Skálafjør›in og Havnina

JOHN JOHANNESSEN

Frá september mána›i fer ta› at taka minni enn eitt korter at fer›ast millum Skálafjør›in og Havnina.

Strandfer›slan fer nevniliga frá september mána›i at leiga norsku tvíkiljuna Varanger Fjord at sigla farlei›ina millum Skálafjør›in og Havnina.

Varanger Fjord er 40 metrar long og tekur 200 fer›afólk. Ferjan hevur eina tænastufer› á 35 míl, men kann sigla 38 míl.

Á dekkinum hevur Varanger Fjord krana, solei›is, at hon eisini kann taka farm.

Farlei›in millum Havnina og Skálafjør›in er 8 fjó›ringar. Tí tekur fer›in bert eitt korter, um ferjan siglir vi› eini fer› á 32 míl, i› er minni enn vanliga tænastufer›in.

Ternan I, sum í løtuni røkir farlei›ina millum Skálafjør›in og Havnina, er 40 ára gomul og treingir til at ver›a skift út vi› n‡ggjari skip. Ternan I tekur 116 fer›afólk um summari› og 50 fer›afólk um veturin. Ternan I er 36,6 metrar long.

Watson aftur fingi› bót

Løgreglan hevur nú givi› Paul Watson eina bót á hundra›túsund krónur fyri brot á útlendingalógina

JOHN JOHANNESSEN

Bretska løgreglan handa›i mikudagin Paul Watson eina bót á 100.00 krónur fyri at hava broti› forbo›i› frá føroysku myndugleikunum fyri at koma inn um føroyska territorialmarki›.

Watson lá vi› skipi sínum, Ocean Warrior, í havnini í Lerwick, tá hann fekk bótina.

Hetta var tann næsta bótin, Paul Watson fekk frá føroysku mynugleikunum seinastu dagarnar. Fyrstu bótina fekk hann 9. juni. Tá var orsøkin til bótina tann sama. Paul Watson var ólógliga komin inn um føroyska territorialmarki›.

Men Watson helt kortini á at koma inn um marki›, hóast hann hev›i fingi› forbo› fyri hesum, til hann t‡skvøldi› fór til Hetlands.

Tí setti føroyska løgreglan seg í samband vi› Interpol, solei›is, at bretska løgreglan kundi geva Watson enn eina bót frá føroysku myndugleikunum, tá hann kom í havn í Lerwick.

Ocean Warrior lá í Lerwick, tá skipi› fekk bótina

Fekk einans st‡rt í st‡ribor›

JOHN JOHANNESSEN

Mikumorgunin fór eitt rør til s‡tipumpuna á Ternuni I, tá hon var á veg fyrsta túrin hendan dagin frá Skálafjør›inum til Havnar.

Avlei›ingin av hesum var, at skipi› einans fekk st‡rt í st‡ribor›.

Ve›ri› var gott mikumorgunin, og tí var aldri nakar vandi á fer›. Harafturat hevur Ternan I eisini bógskrúvu, sum ta› ber til at st‡ra vi›.

Ternan I kom í øllum gó›um til Havnar, men fekk kortini ikki lagt at á Bursatanga, sum vanligt. Í sta›in fekk hon lagt at ytst á molanum.

Breki› á Ternuni I var› skjótt umvælt, og skipi› siglir nú aftur sum vanligt millum Skálafjør›in og Havnina.